**Nýggjar bøkur í juni!**

Bókadeildin gevur út sjey bøkur í ársins fjórða bókaumfari! Les meira um bøkurnar niðanfyri.

**Mumisa 1, 2, 3 Buggilingabók**




Tel úr 1 upp í 10 við hesi flottu faldibókini. Hetta er ein frálík teljibók við mótsetningslitum og nógvum mynstrum og skapum.

Figurar og myndprýðingar eru upprunaverk hjá Tove Jansson.

Bókin er ein faldibók, 10 bls. og til tey umleið 0-1 ára gomlu.




**Grøni kavbáturin hjá abbastabba**

Eitt gandakent ævintýr, sum heimskendi tónleikarin, Paul McCartney, hevur skrivað.

"Góði lesari,

Dámar tær ævintýr? Eg eiti Edward Marshall, eldri. Men abbabørnini kalla meg abbastabba, og tey eru elskulingarnir hjá mær – Lucy, Tom, Emma og Bob. Tað besta, vit vita, er at fara á heilt serligar ævintýraferðir saman. Og hetta er søgan um okkara ferð at finna ein heilt serligan ævintýrara. Kom við okkum á ævintýraferð! Bestu heilsanir, Abbistabbi"

Paul McCartney skrivaði og Kathryn Durst myndprýddi. Niels Jákup Thomsen týddi úr enskum.

Bókin er innbundin, 30 bls. og til tey uml. 2-4 ára gomlu.

## Eg elski teg longu í morgin




Einki er sum fyrr, tá lítlibeiggi kemur. Mamma fær ikki sitið undir Magnusi longur. Og lítlibeiggi dugir so illa at spæla. Magnus leingist til Fyrr. Tað vísir seg, at tað eru tað fleiri, sum gera. Ein omma til dømis. Saman fara tey á ævintýrferð.

Bókin snýr seg um systkinakærleika, sum sleppur at vaksa í síni egnu ferð.

Moni Nilsson skrivaði, og Katarina Strömgård myndprýddi. Julia Rutt Petersen týddi úr svenskum.

Bókin er innbundin, 46 bls. og til tey uml. 5-6 ára gomlu.




## Rimmarveitslan

Lítli Ámundur arbeiðir í stóra køkinum hjá Ludbert hertoga. Uppgáva hansara er at fóðra grísunum við tí, sum loypur av á borðinum hjá hertoganum. Og tað eru nógvar restir. Ottilia, yngsta dóttir hertogan, orkar ikki alt oyðslið og levnaðin á slottinum. Ein dagin ger Ludbert hertogi av at skipa fyri eini rimmarveitslu - eini veitslu, sum skal vara í tríggjar dagar við hópin av mati og drykkjuvørum og veitsluklæddum gestum frá nær og fjar.

Sara Bergmark Elfgren skrivaði, og Emil Maxén myndprýddi. Sigrið Jógvansdóttir Hansen týddi úr svenskum.

Bókin er innbundin, 142 bls. og til tey uml. 7-9 ára gomlu.

**Rænd – Stórveldsins arvingar 1**




Alice og Elias búgva saman við foreldrunum í einum býlingi uttan fyri Uppsala. Eitt kvøldið hvørvur mamman, og løgreglan tekur pápan og misteinkir hann fyri at hava okkurt við tað at gera. Alice og Elias fara út í Lunsenskógin at leita eftir mammuni, men tey finna nakað heilt annað. Har úti hitta tey Brock, ein azkalor frá rúmdarskipinum Kvirruni, sum leitar eftir einari av manningini, sum er horvin. Tað vísir seg skjótt, at Brock og systkini hava ein felags fígginda.

*Rænd* er fyrsti parturin í framtíðarsøgurøðini *Stórveldisins arvingar.* Ein rúmdarsøga, sum inniheldur bæði litrík undurverk og myrkar gátur, ferðmikil ævintýr og óhugnalig møti við tað ókenda.

Oskar Källner skrivaði, og Karl Johnsson myndprýddi. Tóri Rasmussen týddi úr svenskum.

Bókin er heft, 70 bls. og til tey uml. 10-12 ára gomlu.




**Jarnrósan – Stórveldsins arvingar 2**

Alice og Elias ferðast gjøgnum stjørnubreytina saman við manningini umborð á rúmdarfarinum Kvirruni. Tey leita eftir tí kraoaraskipinum, har mamma teirra verður hildin til fanga.

Á rúmdarstøðini Jarnrósuni eydnast tað teimum at finna fíggindaskipið. Trupulleikin er bara, at hundraðtals kraoarakrígsmenn verja tað. Elias og Alice vilja kortini gera alt fyri at bjarga mammuni. Tey gera eina bjargingarætlan og eru væl í gongd við at seta hana í verk, tá alt knappliga verður vent á høvdið …

*Jarnrósan* er annar partur í framtíðarsøgurøðini *Stórveldisins arvingar*. Ein rúmdarsøga, sum inniheldur bæði litrík undurverk og myrkar gátur, ferðmikil ævintýr og óhugnalig møti við tað ókenda.

Oskar Källner skrivaði, og Karl Johnsson myndprýddi. Tóri Rasmussen týddi úr svenskum.

Bókin er heft, 76 bls. og til tey uml. 10-12 ára gomlu.

**Álit – Karanabreytin II**




Saga er farin til gongustjørnuna Kamenia, har Almaz fúrsti ræður fyri borgum, og saman við henni eru omman og sendiboðið frá Samveldinum. Tey koma við boðunum um dómin hjá Tí ovasta Sirklinum til ráðandi fúrstan: Gevst við hersetingini av Hvítoynni, ella verður tú revsaður. Tíverri gongst ikki eftir ætlan, fúrstarnir eru fíggindaliga sinnaðir, og Saga flýggjar við lívinum í vanda á einari fremmandari gongustjørnu. Er tað nakar av teimum trúføstu tænarunum hjá fúrstunum, ið vil hjálpa henni? Og ber til hjá henni at fáa samband við tann einasta persónin á Kamenia, sum hon hevur álit á: Illarion, sonin hjá Almaz fúrsta?

ÁLIT er onnur bókin í science-fiction røðini hjá Ceciliu Eken um styrki og veikleika, tað góða og tað ónda í menniskjum, stríð um vald, svikaráð og kærleika.

Cecilie Eken skrivaði, og Laura Mary týddi úr donskum.

Bókin er heft, 128 bls. og til tey, sum eru 13 ár og eldri.